36. grein: Onnur misnýtsla av børnum Børn hava rætt til verju fyri øllum øðrum sløgum av misnýtslu.	**3. grein: At tryggja áhugamálum barnanna** Tað er samfelagsins skylda at tryggja áhugamálum barnanna, tá avgerðir vera tiknar. Samfelagið hevur skyldu at gera serstakar reglur til verju fyri børnini.	**10. grein: At føra familjur saman** Børn og foreldur hava frítt at fara úr hvørjum landi sum helst og venda aftur til egið land at verða sameind.
18. grein: Barnauppaling Samfelagið hevur skyldu at tryggja, at barnsins foreldur ella verji hava høvuðsábyrgdina av uppalingini, og at geva vegleiðing og hjálp í hesum sambandi.	**29. grein: Endamálið fyri upplæringini** Samfelagið hevur skyldu at tryggja, at upplæringin virkar til at menna barnsins persónsmensku og evni, at hon fyrireikar barnið til eitt virkið vaksnamannalív, fremur virðingina fyri mannarættindum og at mennir virðingina fyri barnsins egnu mentunarligu og tjóðskaparligu virðum.	**23. grein: Brekað børn** Brekað børn hava rætt til bestu hjálp, umsorgan og upplæring at tryggja teirra sjálvsálit og møguleikar til ríkt og virkið lív.

28. grein: Upplæring Børn hava rætt til upplæring, og samfelagið hevur skyldu at tryggja øllum børnum skyldubundnan og ókeypis barnaskúla við menniskjansligum agareglum.	**5. grein: Leiðbeining av foreldrum** Foreldur eiga at verða leiðbeind soleiðis, at børnini búnast samsvarandi evnum og møguleikum teirra.	**22. grein: Flóttabørn** Samfelagið hevur skyldu at tryggja serstaka verju av børnum á flótti ella sum søkja um flóttastøðu og at samstarva við avvarðandi felagsskapir flóttabørnum til verju og hjálpar.
37. grein: Píning og revsing Samfelagsins skyldur mótvegis børnum, ið eru handtikin ella sett í varðhald. Bann fyri píning, grimari ella niðrandi viðferð, revsing, deyða-revsing og lívlongum fongsli. Børn, sum sita í fongsli, hava rætt til menniskjansliga viðferð, mugu ikki sita saman við vaksnum og hava rætt til samband við familjuna.	**33. grein: Misnýtsla av rúseitri** Børn hava rætt til verju fyri misnýtslu av rúseitri og fyri at verða sett í arbeiði við framleiðslu og sølu av rúseitri.	**11. grein: Barnaræning** Samfelagið hevur skyldu at forða fyri, at børn verða rænd í útlondum av foreldrum ella øðrum.